# FM í amboðsfimleiki

**Um vikuskiftið fara fimleikarar úr Støkk, Havnar Fimleikafelag og Ljósinum at kappast um føroyameistaraheitið í amboðsfimleiki**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Kappingin fer fram í høllini á Rituvíkshálsi, og fevnir um kappingin um bæði gentur, kvinnur, dreingir og menn.

Talan er í hesum umfarið um teir báðar eldru aldursbólkarnar, bólk 3 og bólk 4. í bólki 3 kappast tey sum eru fødd í 1989/90 og í bólki 4 tey sum eru fødd í 1988 ella fyrr.

Kappingin er býtt í tvey, fyrst FM fyri einstaklingar og lið og síðani FM fyri hvørt amboð. Leygardagin verður kappast um samlaða føroyameistaraheitið bæði fyri einstaklingar og fyri lið. Hendan kapping er samstundis at rokna sum kvalifikatión til kappingina sunnudagin. Sunnudagin verður kappast um FM í hvørjum amboðið fyri seg.

Kappast verður í trimum amboðsgreinum. Gentur/kvinnur kappast í lopi, á gólvi og á bita, meðan dreingir/menn kappast í lopi, á gólvi og í ringum. Gentur/kvinnur hava tó eina eyka grein, sum kallast 'basic line'. Stigini sum fáast í basic line leygardagin telja ikki við í einstaklingakappingini, men verða nýtt sum kvalifikatión til amboðskappingina sunnudagin tá amboðskappingin verður.

Byrjað verður báðar dagarnar kl. 14.00.



*Fleiri enn hálvt annað hundrað fólk hava boðað frá luttøku til hondbóltsgalla'ið leygarkvøldið*

# So verður gallakvøldið

**Leygarkvøldið er kvøldið, tá hondbóltsfólkini fara at minnast á júst lidna kappingarárið**

HONDBÓLTSGALLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kyndil og Stjørnan gjørdust meistarar. Tann spurningurin kann so ikki diskuterast.

Men fyri tað eru helst nógv onnur ivamál, sum hondbóltsfólk kring landið vilja loysa, og leygardagin hava tey so eisini møguleikan til hetta.

Klokkan 19.00 leygarkvøldið byrjar árliga gallakvøldið hjá hondbóltinum nevnliga, og einki er at ivast í, at tað eru fleiri av teimum, sum eru farin í summarfrí, ið gleða seg til hetta kvøldið.

### Satsa-verturin skal stýra

Í ár er tað H71, sum skipar fyri kvøldinum, sum skal haldast í nýggjaru høllini í Skúlanum í Hoyvík. Og tá vit hóskvøldið fregnaðust, hvussu undirtøkan mundi vera, tóktust tey at lata heilt væl at.

Á leið 150 fólk hava boðað frá luttøku, og sum skilst er hetta væl spjatt. Soleiðis at sklija at talan verður um hondbóltsfólk úr øllum feløgum, fleiri dómarapør eins og umboð fyri Hondbóltssambandið og fjølmiðlarnar verða á staðnum.

Fyrsti stóri parturin av kvøldinum fer sjálvandi við borðhaldinum, sum í ár verður skipað sum ein stórsligin buffét. Undirhald og stýring skal sjálvandi eisini til, og at stíla fyri hesum hava hoyvíkingar fingið fatur á Hera Jacobsen. Hann man annars mest vera kendir frá starvinum sum útvarpsvertur um summarið, og sum Satsavertur er hann vanur at vera í leiklutinum sum dómari. Men spurningurin er so, hvørt royndirnar í hesum kunnu nýtast til at halda skila á 150 hondbóltsfólkum.

Hæddarpunktið undir borðhaldinum verður sjálvandi, tá steypini til tey, sum eru kosin ársins bestu, verða latin. Góð orð fara ivaleyst eisini at falla á vegnum til tey, sum trína fram eftir skreytinum, og lógvabrestirnir plaga ikki at vera fáir í tali.

Seinni um kvøldið verður dansur, soleiðis at beinini kunnu strekkjast nakað eftir góður bitarnar, og einki er at ivast í, at tað síðani verða skift nógv orð um, hvørt talan nú var um yvirtraðk ella ikki og brotskast ella ikki í nøkrum av teimum støðum, sum fingu avgerandi ávirkan á kappingarárið.

# VB-spælari skorar fyri Brøndby

**Fyrrverandi VB-spælarin Lukasz Cieslewicz hevur skora mál á samlaband fyri unglingaliðið hjá Brøndby seinastu vikuna**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Bæði í fjør og í fyrraárið vunnu dreingirnir hjá VB føroyameistaraskapin. Ein spælari á liðnum, sum hevði avgerandi leiklut í hesum heiðursmerkjum var póllendingurin Lukasz Cieslewicz. Hann var í Føroyum, tí pápi hansara, Robert, hevur spælt og verið venjari í Føroyum í fleiri ár.

Lukasz er framúr góður álopsspælari, og hann gjørdi nógv mál fyri dreingjaliðið hjá VB.

Lukasz ger framvegis nógv mál, men nú er tað fyri danska felagið Brøndby.

Í fjør gjørdi hann sáttmála við Brøndby, og nú spælir hann fyri unglingaliðið hjá teimum.

*Tað gongur við fullari ferð hjá Lucasz Cieslewicz í Brøndby, og um páskirnar skeyt hann fýra mál í sterkari kapping í Týsklandi*



### Vunnu kapping í Týsklandi

Lukasz Cieslewicz var ein av spælarunum á unglingaliðnum hjá Brøndby, sum á páskum vann eina sterka kapping í Týsklandi. Og Lukasz gjørdi rættiliga um seg, tí hann skoraði fýra mál í teimum fýra dystunum, sum Brøndby spældi.

Mikukvøldið byrjaði unglingakappingin í Danmark aftur, og har eydnaðist Brøndby at vinna 4-2 á Farum. Lukasz Cieslewicz skoraði tvey av málunum í tí dystinum.

Eisini unglingaliðið hjá Frem, har tríggir føroyingar spæla við, vann sín dyst í gjárkvøldið.

Bæði Frem og Brøndby spæla við í bestu unglingadeildini í Danmark, og líkt er til, at fyrrverandi VB-spælarin gongur einari bjartari framtíð í møti í danska felagnum.



# Bert tvey eru trygg

**Í seinasta umfarinum í bókaspælinum berjast fýra lið um seinasta heimavøllin og onnur fýra um bestu 3'ara-plássini**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinasta umfarið í kappingini um Løgmanssteypið stendur á skránni um vikuskiftið, og tó at seks av teimum átta fjórðingsfinalusessunum eru greiðir, so er framvegis nógv at stríðast fyri hjá flestu liðunum.

B36, GÍ,KÍ, ÍF, VB og HB eru longu vís í at eiga sess millum tey seinastu átta, men av hesum eru tað bert tey bæði fyrst nevndu, sum eru vís í at fáa fyrimunin av heimavølli og einum á pappírinum veikari mótstøðuliðið í fjórðingsfinaluni.

Tað er nevnliga so, at tað verða teir tríggir bólkavinnararnir, sum koma at spæla á heimavølli í fjórðingsfinalunum. Og tá hetta samstundis merkir, at hesi lið sleppa undan at hitta tey, sum hava staðið seg best í bólkaspælinum, er sjálvsagt, at nógv verður lagt fyri í royndunum at vinna seg fram millum hesi.

Tað liggur fast, at í øllum førum vinnarin av fyrra dystinum í Havn – HB og VB spæla klokkan 14 – fær heimavøll, og møguleikin er so avgjørt til staðar, fyri at bæði tvey skulu fáa hendan fyrimunin. Ein javnleikur vil sum so eisini tryggjað hesum, og tí kundi verið upplagt, at bæði liðini bara fara á vøllin at avgreiða ein málleysan javnleik, men tað vildi tó ikki líkst hugburðinum hjá nøkrum teirra.



*Einasti bólkurin, har vinnarin enn ikki er funnin, er bólkur trý, har HB og VB hittast í Gundadali leygardagin*

Taparin kemur so undir øllum umstøðum at hava 12 stig, og tað er tað mesta, sum ÍF og KÍ kunnu røkka, og so er spurningurin, hvønn leiklut málmunurin tá kann fáa.

Her stendur í løtuni best til hjá VB, sum kanska væl kann tola at tapa við einum máli ella tveimum, men hetta er so treytað av, at ÍF ikki vinnur stórsigur, tá TB vitjar.

Málmunurin hjá KÍ er eisini hampuliga góður, men teir hava ta á pappírinum truplastu uppgávuna, tá teir á útivølli skulu takast við B36. Men hinvegin kann tað her gerast ein fyrimunur, at árstalsfelagið í høvuðsstaðnum longu hevur vissað sær oddasessin.

### NSÍ besta útgangsstøðið

Seinastu tvey plássini til fjórðingsfinalurnar verða latin til teir báðar trý'ararnar, sum hava staðið seg best, og her kappast fýra lið um tey bæði plássini.

Best sær her út hjá runavíkingum, sum hava fimm stig, og sum við einum sigri á framvegis stigaleysa FS Vágum kunnu tryggjað sær heitið sum besti trý'arin.

B68 og EB/Streymur hava bæði fýra stig undan seinasta umfarinum, og her sær í løtuni betri út hjá felagsliðnum. Teir taka á heimavølli móti Skála, sum tó við einum sigri kann leggja seg út í stríðið, men tað krevur so eisini, at úrslitið hjá B68 einki fær burturúr sínum dysti.

Toftamenninir hava trupla uppgávu, tá teir á heimavølli taka móti GÍ, sum er einasta liðið við fullum stigatali, og júst á Svangaskarði hevur GÍ í óvanliga stóran mun hagtølini við sær. So er spurningurin, hvørt gøtumenn leggja so nógv fyri hesaferð, nú oddasessurin kortini er greiður.

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

**Bólkur 1**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 5 | 4 - 1 - 0 | 19 | 3 | 16 | 13 |
| 2 | KÍ | 5 | 2 - 3 - 0 | 14 | 5 | 9 | 9 |
| 3 | NSÍ | 5 | 1 - 2 - 2 | 8 | 10 | -2 | 5 |
| 4 | FSV | 5 | 0 - 0 - 5 | 2 | 25 | -23 | 0 |

**Bólkur 2**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 5 | 5 - 0 - 0 | 11 | 1 | 10 | 15 |
| 2 | ÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 11 | 5 | 6 | 9 |
| 3 | B68 | 5 | 1 - 1 - 3 | 4 | 8 | -4 | 4 |
| 4 | TB | 5 | 0 - 1 - 4 | 2 | 14 | -12 | 1 |

**Bólkur 3**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 5 | 4 - 0 - 1 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 2 | HB | 5 | 4 - 0 - 1 | 9 | 8 | 1 | 12 |
| 3 | EB/S | 5 | 1 - 1 - 3 | 6 | 12 | -6 | 4 |
| 4 | Skála | 5 | 0 - 1 - 4 | 7 | 15 | -8 | 1 |

## Dystir um vikuskiftið

**Kappingin um Løgmanssteypið**

Bólkur 1

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 17.04 | B36-KÍ | Oddmar Andreasen |
| 17.04 | NSÍ-FSV | Eiler Rasmussen |

Bólkur 2

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 17.04 | ÍF-TB | Páll Augustinussen |
| 17.04 | B68-GÍ | Suni Johansen |

Bólkur 3

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 17.04 | EB/S-Skála | Dagfinn Olsen |
| 17.04 | HB-VB | Petur Skarðenni |

**Steypakappingin hjá kvinnum**

| | | |
|---|---|---|
| 18.04 | FSV-KÍ | Emil Hentze |
| 18.04 | EB/S-HB | Aron Olsen |
| 18.04 | AB-GÍ/B68 | Finnur Andreasen |
| 18.04 | B36-Sumba | Andrew Christiansen |

# Sterkir fraklendingar

PFA, enska sambandið hjá fótbóltsleikarum, hevur nú boðað frá, hvørjir teir nomineraðu leikararnir til heitið sum »players player of the year« eru.

Og skuldi nakar ivast, so vísir listin greitt, at tað eru ikki hvørjir sum helst, sum Føroyar skulu hitta, tá Fraklands-dysturin er á skránni.

Millum teir fimm bestu leikararnar í Onglandi eru tveir fraklendingar, og ikki óvæntað eru tað teir báðir Arsenal-leikararnir, Patrick Vieira og Thierry Henry.

Henry var eisini maðurin, sum í fjør endaði ovastur í atkvøðugreiðsluni, og undan honum var tað Robert Pires, sum fekk heiðurin, og eisini hann verður væntandi á liðnum, sum okkara egnu kosnu skulu takast við.

Til heitið sum ársins leikarar eru annars nomineraðir: Thierry Henry (Arsenal), Patrick Vieira (Arsenal), Steven Gerrard (Liverpool), Frank Lampard (Chelsea), Alan Shearer (Newcastle) og Jay-Jay Okocha (Bolton).

Samstundis kann nevnast, at til ársins unga leikara eru nomineraðir: Glen Johnson (Chelsea), Scott Parker (Chelsea), Shaun Wright-Phillips (Manchester City), Wayne Rooney (Everton), John Terry (Chelsea) og Kolo Toure (Arsenal).

**-jm**